





ítróttur

Nr. 87 • hósdagur • 9. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

HB-KÍ:

# Stóri klassikarin

**Dystirnir millum HB og KÍ hava altíð verið serligir, og einki er at ivast í, at nógv verður lagt fyri av báðum pørtum, nú liðini tørna saman**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Í dag er ein av klassikarunum í føroyskum fótbólti á skránni. HB tekur ímóti KÍ í Havn. Her dystast Jón Rói Jacobsen úr HB og Jan Joensen úr KÍ um bóltin*

Tað man ikki vera frítt, at kassameistarin í HB man iðra seg um, at heimadysturin móti KÍ er settur somikið tíðliga á árinum, sum hann er í ár.

Tá uppgerðin millum liðini hevur ligið seint á árinum, hevur talan ofta verið um avgerandi dystir, við stúgvandi fullum leikvølli sum positiv avleiðing, og tó at tað uttan iva verða nógv fólk í Gundadali hósdagin, so er spenningurin ikki heilt hin sami.

### Allir tøkir

Enn er eisini nakað tíðliga at tosa um, hvørjir dystir millum hvørji lið verða avgerandi, men tað stendur tó undir øllum umstøðum fast, at klassikarin í føroyskum fótbólti stendur ímillum HB og KÍ, og bara hetta í sjálvum sær ger, at hvør einasti leikari á báðum liðunum sær fram til uppgávuna.

Í HB man lagið heldur ikki gerast verri av góðu byrjanini, sum liðið fekk, tá teir í fyrsta umfarinum sópaðu runavíkingar av vegnum. Ein endurtøka móti KÍ vil í hvussu so er styrkja enn meira um sjálvsálitið, tí so hevur liðið fingið fult burtur úr tveimum á pappírinum torførum heimadystum.

Og tað er eisini líkt til, at HB er væl fyri til uppgávuna. Úr leguni verður sagt, at allir mans eru tøkir. Eisini Jan Dam, sum annars hevur verið burturstaddur, og hetta letur so upp fyri einum positivum trupulleika hjá venjaranum, sum skal gera av, hvørt hann so skal flyta Jóhannus Joensen úr miðverjasessinum, sum hann røkti so væl móti NSÍ.

### Borgar fyri undirhaldi

Eisini KÍ venjarin man hava sítt høvuðbrýggj við at finna út av, júst hvussu liðið skal setast saman.

Jan Andreasen, sum vanliga eigur fastan sess í miðverjuni, er framvegis ikki tøkur. Tað er fyrrverandi HB-leikarin, Grímur Vang, heldur ikki, hóast hann kundi verið eitt alternativ at nýtt fyri Jan.

Fyri hinar leikararnar er tó galdandi, at teir allir eru til reiðar at tørna út, og so er spurningurin bara, hvussu hetta verður sett saman. Seinast røktu Alexander Djordjevic og Allan Joensen miðverjusessirnar, og hóast teir komu hampuliga væl frá hesum, so er ikki óhugsandi, at tørvur kann vera á teimum longur frammi á vøllinum.

Við tapinum í fyrsta umfarinum fekk KÍ annars eina vána byrjan upp á landskappingina, eftir at lagnan heldur ikki var teimum serliga blíð í steypakappingini. Enn er sjálvsagt ov tíðliga at gita um endaligu støðurnar, men verður liðið aftur stigaleyst hesaferð, eru longu seks stig upp í oddin, og tað kann vera tungt sálarliga hjá liðnum.

So lítið og einki er at ivast í, at báðir partar fara eftir sigrinum hesaferð, og hetta saman við øllum tí, sum vanliga hoyrir til eina uppgerð av slikum slag, fer uttan iva at viðføra, at áskoðararnir, sum leita sær í Gundadal, fara at fáa ein dyst har undirhaldsvirðið í øllum førum verður høgt.

# Hugburðurin skal vera øðrvísi

**NSÍ, sum ikki sýndi gott avrik í Gundadali, hevur trýstið á sær, tá GÍ kemur til Runavíkar**

NSÍ-GÍ
*Jóannes Hansen*

Fyrsta royndin hjá NSÍ gekk ikki væl. Í Gundadali løgdu teir ímóti einum væl uppløgdum HB liði rygg til 4–0 tap. Í dag fáa teir í Runavík vitjan av grannunum úr Gøtu. Um NSÍ ikki skal detta niður ímillum beinanvegin, so er alneyðugt, at teir fáa nakað burtur úr hesa ferð.

Jógvan Martin Olsen er venjari hjá NSÍ. Hann var ikki nøgdur við tað, hann var vitni til sunnudagin, og hann ásannar, at tað skulu aðrir bollar á suppuna ímóti GÍ, um nakað skal fáast burturúr:

– Ímóti HB var tað bara Jens Martin Kndusen, sum vísti tað, hann megnar. Vit vóru ikki nóg ágrýtnir. Verjuparturin var ov lítið avgjørdur, og tað hevði við sær, at vit alla tíðina vóru undir trýsti og ongantíð fingu álopsspæl í lag. GÍ hevur nógvar sera rutineraðar spælarar. Teir eru støðugir í sínum avrikum, og tað er altíð torført at spæla ímóti teimum, heldur Jógvan Martin Olsen.

Kári Hansen noyddist at fara av vøllinum longu tá fyrra umfarið var hálvrunnið í Gundadali. Hann hevur trupulleikar við rygginum, og hann verður ikki við ímóti GÍ.

Gøtumenn eru væl nøgdir við javnleikin á Toftum, og teir vóna í hvussu so er sama úrslitið í Runavík.

Liðformaðurin, Sámal Joensen, sigur, at manningarliga eru teir eitt sindur betri fyri hesa ferð, enn teir vóru sunnudagin:

– Súni Fríði Johannesen var ikki við á Toftum. Hann hevur havt trupulleikar við beininum, men nú hevur hann vant aftur. Popczynski hevur framvegis trupulleikar við knænum. Hatta er ein skaði, sum hann fekk tíðliga á árinum í venjingardysti ímóti KÍ. Hann spælir verri enn so við fullari ferð, men hann verður ivaleyst eisini við ímóti NSÍ, sigur Sámal Joensen.

Henning Jarnskor var ikki við ímóti B68, og vit skilja á lagnum, at hann verður heldur ikki við ímóti NSÍ. Súni Olsen er á veg aftur til GÍ, men hann verður ikki við í dag.

# Skála í kolkjallaranum

**Skála skal standa sína torførastu roynd í landskappingini higartil. Á heimavølli taka uppflytararnir ímóti meistarunum úr B36. Skála er fullmannað, meðan Klæmint Matras framvegis ikki er klárur hjá havnarliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tað vóru nakrir vónbrotnir skálamenn, sum sunnudagin fóru av vøllinum á Mølini á Eiði. Teir høvdu tveitt javnleikin burtur eftir eina grova verjuvillu móti endanum av dystinum. Hesin dysturin kann vísa seg at fáa stóran týdning í botnstríðnum, og tí var hetta ein dyggur smeitur. Lívið á toppinum kann vera kalt, hava skálamenn sannað.

Í dag er tað B36, sum kemur á vitjan á Skála. Heimaliðið hevur allar leikarar tøkar, tí eingin hevur leikbann, og eingin er skaddur. Hetta gevur teimum kanska dirvi til dystin móti B36.

Ronnie Hansen og Aleksandur Johansen høvdu báðir leikbann til dystin móti EB/Streymi, eftir at teir fingu reytt kort móti HB í steypakappingini. Teir báðir eru við aftur, og væntandi byrja teir inni á liðnum. So detta tveir aðrir leikarar út á beinkin.

Ronnie og Aleksandur hava spælt at kalla allar dystirnar í ár, og tí styrkir tað nógv um liðið at fáa hesar báðar við aftur. Ronnie er verjuleikari, meðan Aleksandur Johansen spælir í álopinum.

Hóast leikararnir hava verið í kolkjallaranum síðan dystin sunnudagin, so mugu uppflytararnir royna at reisa seg aftur, tí tað nyttar ikki at gráta um spilta mjølk. Spennandi verður at síggja, hvussu dygga mótstøðu skálamenn megna at geva B36.

### John heimaftur

Hetta er fyrstu ferð, at Skála er við í 1. deild, og nú vendir ein av synum felagsins heimaftur. Talan er sjálvandi um liðformannin hjá B36, John Petersen, sum endiliga sleppur at spæla 1. deildar fótbólt á Skála.

Annars er B36 hampuliga væl fyri við leikarum. Tann einasti av føstu monnunum, sum ikki verður við á Skála, er Klæmint Matras, sum enn ikki er sloppin av við skaðan í fótinum. Hetta er ein stórur missur fyri B36, men í Klaksvík riggaði miðvøllurin til fulnar, hóast Klæmint ikki var við. Tá spældu Kenneth Jacobsen, Magni á Lakjuni og Din Sandu á miðvøllinum.

Venjarin hevur somu manning við inn á Skála, sum hann nýtti í Klaksvík. Spurningurin er so, um hann velur at fremja nakrar broytingar millum teir leikarar, sum hann hevur í hópinum.